# – NMT 450-skipanin verður niðurløgd 31. desember 2005

TÍÐINDASKRIV

31. desember 2005 verður NMT 450-skipanin hjá Føroya Tele niðurløgd. Framleiðararnir av skipanini kunnu ikki longur bjóða eykaútgerð ella tænastu til skipanina, og tí er Føroya Tele ikki ført fyri at veita nøktandi tænastu ella trygd fyri NMT-samrøðum.

Í grannalondum okkara, Danmark, Noregi og Svøríki (31.03.2005) er NMT 450-skipanin eisini avtikin.

Fyri NMT 450 hevur Føroya Tele gjørt íløgur í langtrøkkandi GSM. Langtrøkkandi GSM víðkar útbreiðsluøkið av GSM á havøkinum kring Føroyar. Tríggjar støðir eru settar upp í Føroyum: ein á Klubbanum í Fugloy, ein á Knúki í Mykinesi og ein á Spóafelli í Suðuroy.

Langtrøkkandi GSM kann í stóran mun nøkta tørvin á fiskileiðum kring Føroyar, men skipanin bøtir ikki munandi um sendinetið tætt undir landi ella millum oyggjarnar. Nøkur øki tætt undir landi, sum NMT 450 hevur rokkið, virka ikki við GSM. Hinvegin eru tað eisini øki, sum NMT 450 ikki røkkur, men sum virka við GSM.



Fyri at nøkta tørvin á samskifti á teimum økjum, har GSM-skipanin ikki røkkur, er møguligt at nýta nýtímans fylgisveinatænastur, sum røkka útyvir vanliga fjarskiftiskervi á landi, á sjógvi og í luftini.

Føroya Tele arbeiðir støðugt við at útbyggja GSM-tænastuna. Við tíðini vilja eisini tey øki, har NMT 450 røkkur nú, men ikki GSM, koma undir útbreiðsløkið fyri GSM.

Vanligar GSM-telefonir kunnu nýtast longri úti, enn vanligt hevur verið fyrr. Alt eftir hvør terminalútgerð verður nýtt, hvørja støð terminalurin hevur samband við og hvussu høgt antennan er sett yvir havið, ber til at nýta GSM-fartelefonskipanina út til umleið 43-54 fjórðingar úr landi.

Tað er av alstórum týðningi at leggja til merkis, at NMT 450 eins og GSM ikki er ein trygdarskipan, men ein samskiftistænasta sum Føroya Tele veitur. Skipini hava ábyrgd av at hava góðkenda trygdarskipan umborð og ikki leggja álit einans á eina samskiftistænastu.

Føroya Tele:

# »Stjerne for en aften»

TÍÐINDASKRIV

Føroyingar hava, í samband við sendingina »Stjerne for en aften« hjá Danmarks Radio, havt møguleika at atkvøtt fyri luttakarunum í sendingini. Føroya Tele hevur staðið fyri tøkniliga partinum, sum ger tað møguligt hjá kundunum hjá Føroya Tele at atkvøða og eingir trupulleikar hava verið hesum viðvíkjandi. Føroya Tele harmast, at vantandi kunning á sjónvarpsskíggjanum hevur ført við sær ivamál um, um tænastan hevur virkað. Eisini kann Føroya Tele upplýsa at føroyingar hava atkvøtt og atkvøðurnar eru taldar við.

Fyri at atkvøða skal hyggjarin hava røttu endatølini, sum verða upplýst í sendingini. Eisini skal hyggjarin minnast til at sláa 0045 framanfyri danska nummarinum. Atkvøðan er skrásett, tá ið hyggjarin fær bundnan tóna, tvs. at hyggjarin ikki fær samband við nakran í hinum endanum. Uppringingin er ókeypis. Ikki ber til hjá føroyingum at atkvøða við sms-boðum.



